B36-EB/Streymur:

# Favorittarnir ávaraðir

**EB/Streymur hevur longu tikið fleiri á bóli í ár, so B36 er ávarað ímóti at taka uppgávuna og lætt**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað var ikki meira enn akkurát, at B36 knógvaði EB/Streymi í steypakappingini, og FM-favorittarnir úr høvuðsstaðnum eru ikki teir einastu, sum hava ásannað, at EB/Streymur neyvan verða lættir at taka í ár.

Tí er einki at ivast í, at teir í árstalsfelagnum eru ávaraðir hesaferð, og sum skilst, so taka teir í øllum førum ikki nakað fyri givið.

Liðið er annars eitt lítið sindur skert undan hesum dystinum. Heini í Skorini, Jens Kristian Hansen og Bárður Mortansson eru allir um at koma fyri seg eftir skaða, men enn eru teir ikki heilt klárir. Tað er Sverrir Kjærbo neyvan heldur, eftir at hann fyrst mest sum spældi seg inn á liðið, fyri síðani at fara skaddur av vøllinum norðuri í Klaksvík. Tað gevur so aftur pláss til Klæmint Matras, sum hevði leikbann tann dystin. Hartil hevur B36 nú loyvi at nýta Rúna Elttør, og spurningurin er so, um kemur beina leið inn til teir fyrstu ellivu.

Hjá EB/Streymi er væntandi, at allir mans verða tøkir, men fyrireikingarnar í vikuni hava ikki verið heilt optimalar. Ronnie Samuelsen og Hallur Joensen høvdu báðir leikbann seinast eftir reyð kort móti júst B36, og teir verða so báðir tøkir sunnudagin. Tað verða Jákup Martin Joensen og Egil í Bø helst eisini, men felags fyri teir er, at teir ikki hava vant í vikuni vegna ávíkavist sjúku og ferðing.

NSÍ-HB

# Tað verður altso sunnudagin

**Upprunaliga mánadag, síðani flutt til leygardag, men nú verður tað so sunnudagin, at HB vitjar í Runavík**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað hevur skapt eitt sindur av ónøgd, at dystirnir í bestu mansdeildini hava verið kastaðir aftur og fram hesi bæði fyrstu umførini. Fyrst var tað dysturin ímillum GÍ og KÍ í fyrsta umfari. Hann skuldi upprunaliga verði leiktur ein dag undan øllum øðrum dystum, men hóast mótmæli frá báðum feløgum, so flutti FSF dystin.

Nú er tað so dysturin ímilum NSÍ og HB, sum er orsøk til ruðuleika. Upprunaliga var dysturin ásettur til mánadag, men tá bæði liðini hildu tað vera ov strævið at spæla mána- og hósdag, spurdu tey um loyvi at spæla dystin leygardag ístaðin.

Hetta varð játtað teimum, men brádliga komu boð um, at dysturin kortini skuldi spælast sunnudag.

Kappingarstjórin í FSF, Karl Vidtfeldt sigur, at tað sjálvandi kann vera óheppið, at dystir soleiðis verða fluttir, og sjálvur hevur hann so ikki vilja skapt nakran illvilja við hesum.

- Fyrst og fremst, so er eitt formligt mistak farið fram, tí undirskriftin hjá dómaranum er ikki á skjalinum um dystarflyting, og tað eigur hon at vera. Hartil var sum so heldur eingin grundgeving fyri at flyta dystin, og tað plagar vanliga at vera kravt. Harnæst er at siga, at nøkur mistøk eru farin fram í avgreiðsluni av málinum. Ikki minst tað, at eg ikki visti av, at feløgini høvdu fingið játtan um at flyta dystin, áðrenn eg gav boð um at spæla sunnudag, men tað hevði so sínar orsøkir, sum annars eru óviðkomandi.

- Hartil skal tó eisini sigast, at á fundi við feløgini var semja um, at so vítt gjørligt áttu fleiri eysturoyardystir ikki at verða spældir sama dag. Tað var hetta, sum eg hevði í huga, og har var eisini ein onnur umbøn um dystarflyting. Tað var Skála-B68, sum vildu spæla stevnudyst leygardagin, og tann umbønin var komin áðrenn tann hjá NSÍ og HB. Dysturin er tó framvegis skumpaður ein dag fram í mun til upprunaligu skipanina, og eg kunnaði báðar partar, áðrenn avgerðin varð send víðari, so eg haldi ikki, at málið skal verða orsøk til so øgiliga øsing sigur Karl Vidtfeldt at enda.

Um dystin er annars at siga, at báðir partar eru á leið so væl fyri, sum tilber. Hjá NSÍ verður sagt, at har eru allir mans tøkir, Kári Hansen og Gert Langgaard hava báðir verið skaddir, men teir hava so vant í vikuni, og roknast kann við, at teir í øllum førum eru við í hópinum.

Hjá HB eru Jan Dam, Kári Nielsen og Martin Christiansen allir langtíðarskaddir, men í aðrar mátar eru allir mans tøkir, og boðini úr Havn vóru í øllum førum, at nú skuldi tapið frá steypakappingini hevnast.

Skála-B68:

# Arnbjørn aftur á B68 liðnum

**Skálamenn eru væl fyri, nú teir triðju ferð í eina stóra viku skulu royna seg ímóti oyggjafeløgum**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Á Skála er bygdarstevna hetta vikuskiftið. Stevnuhýrurin hevði fingið eitt kvink rætta vegin, um tað hevði eydnast at vinna ímóti B68, sum vitjar longu klokan tvey seinnapartin í dag.

Skála er fyri fyrstu ferð á heimavølli í ár, og hetta er triðja ferðin, at teir síðani Dýra biðjudag spæla ímóti einum øðrum Eysturoyar liði. Úrtøkan ímóti NSÍ og GÍ hevur ikki staðið mát við leikliga avrikið. Tí kunnu toftamenn vanta torføra avbjóðing, tá ið teir fara um fjørðin.

Á Skála eru allir spælararnir tøkir, og tað kann væl vera, at Pauli G. Hansen, sum leingi hevur verið skaddur, og sum í 2. hálvleiki í Gøtu mikukvøldið vísti, at hann er tøkur aftur, verður ímillum teir fyrstu ellivu.

Nú er ein mánaði síðani Arnbjørn Danielsen skifti úr B36 og til barndómsfelagið á Toftum, og hann verður í B68 verjuni á Skála. Hans Fróði Hansen hevur verið burturstaddur í vikuni, men hann verður við í dag.

Í fjør bjargaði Skála sær undan næstaftasta plássinum í síðsta umfari, tá ið teir vunnu 3–2 á Svangaskarði. B68 vann undan summarsteðginum 2–1 á Skála.

KÍ-VB:

# KÍ aftur nýggja miðverju

**VB málverjin skal fyri fjúrtandu ferð royna at halda Vágs málið tætt í Klaksvík, har tað í fjør eydnaðist at fáa málleysan javnleik**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Málini eru skolað ígjøgnum hjá KÍ, og nú er aftur neyðugt at skifta miðverju. Í fjórðingsfinaluni í steypakappingini vóru Aleksander Djordjevic og Ove Nysted miðverjar. Nú eru teir báðir burtur frá. Djordjevic er ikki komin fyri seg enn eftir fótliðsskaðan 4. mai, og Ove Nysted varð so mikið illa skaddur í fótinum ímóti B36 sunnudagin, at hann skal binda frið í tvær vikur, verður sagt úr Klaksvík.

Málverjin, Kartin Joensen, hevur eftir samanstoyt í ódnarveðrinum ímóti B36 havt trupulleikar. Hann vandi ikki fyrrapartin av vikuni, men hann var vandi hóskvøldið og verður við í morgin. Liðformaðurin, Allan Joensen, var leikbannaður ímóti B36 og er tøkur aftur.

Hjá VB eru tríggir spælarar burtur frá. Mikael í Lágabø fekk spark í skinnabeinið ímóti B36 og er ikki komin fyri seg, og Jón Gørdbo hevur bruna í skinnabeininum og hevur ikki vant síðstu vikuna. Miðverjin Dejan Nikolic er leikbannaður eftir útvísingina ímóti B36.

Bjarni Johansen verður í VB málinum í Klakvík. Hann var fyrstu ferð við VB í Klaksvík í 1988. Síðani hevur hann verið hvørja ferð burtursæð frá í 1990, tá ið Egil Steintórsson vardi málið, og í 1993, tá ið hann var í Århus. Í fjør megnaði hann at halda tætt, hóast KÍ trýsti. Dýra biðjudag megnaði hann eisini at halda tætt, tá ið B36 var á Vágseiði. Tá var úrslitið 0–0. Tveir dagar seinni vann B36 7–1 í Klaksvík, men vágbingar vilja ikki hoyra talan um, at teir nú eru favorittar ímóti KÍ.

Í Klaksvík siga teir, at tað var eitt sindur óhugaligt at venja fyrst í vikuni, men nú er lagið aftur, sum tað skal, burtursæð frá at tað altíð er harmuligt at síggja burtur frá lyklaspælarum.

FS Vágar-GÍ:

# Vágamenn hava gott tak á GÍ

**Hjá gøtumonnum haltar tað framvegis, og nú er Bárður á Lakjuni eisini rættuliga ivasamur**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Hagtølini siga, at FS Vágar ofta hava havt gott tak á GÍ. FSV gav GÍ ein skarpan gang í fjórðingsfinaluni í Sarpugerði tíðliga í hesum mánaðinum, og undanfarin ár hevur tað eisini roynst væl. Í 2000 tapti GÍ 2–0 har vesturi, meðan teir í 2001, tá ið FSV flutti niður, vunnu 4–1.

Hjá gøtumonnum er heilsustøðan framvegis einki at reypa av. Súni Olsen spældi mikukvøldið, og hann verður kanska við í morgin, men hann er ikki hundrað prosent klárur. Gidek hevur ikki vant í vikuni, og hann er sera ivasamur. Bárður á Lakjuni spældi ikki við fullari ferð mikukvøldið, og hann er ivasamur. Tað er knæið, sum so ofta áður hevur hildið honum uttanfyri, sum aftur er skaðaplágað.

Hjá heimaliðnum í Vágum halda teir seg vera væl fyri við fólki í ár, men hesa ferð eru fleiri ivasamir, og teir hava ikki vant í vikuni. Kanska onkur teirra kortini verður við í morgin.

Bjarni Prior fekk trælær ímóti HB. Men hann vandi aftur hóskvøldið, og teir vóna, at hann verður við í morgin. Vladlens Osipov noyddist at taka seg burtur úr ímóti HB, tí hann var plágaður av lærskaða, og tað sama hevur í vikuni hildið Ruslan Screlea burtur frá venjingini. Eyðfinn Fjalsbak hevur orsaka av ryggskaða ikki spælt síðani 21. apríl, men teir vóna, at hann verður tøkur aftur í næstu viku.



# Á slóðini eftir Víkingar

TÍÐINDASKRIV

Føroya Fornminnissavn og Ferðaráð Føroya eru farin undir eitt søguligt samstarv. Talan er um eina trý ára norðurlendska ES verkætlan nevnd 'Destination Viking - Saga Lands - Sagas & Storytelling'.

Endamálið við hesi felags verkætlanini er í stuttum at gera søguna - serliga víkingatíðina - meiri sjónliga og at gera hana atkomuliga hjá ferðafólki.

Við í samstarvinum eru 17 partar úr 6 londum harav 2 innan ES: 2 partar eru úr Føroyum, 6 úr Íslandi, 2 úr Grønlandi, 3 úr Noregi, 2 úr Svøríki og 2 úr Skotlandi (Hetland og Orknoyar). Harafturat eru Gotland, Man og Kanada (New Foundland og Labrador) við sum eygleiðarar.

Sum heiti sigur, verður í allari verkætlanini bygt á tær íslendsku søgurnar, og verkætlanin fevnir tí um tey lond, sum eru partar av hesum søgum frá landnámstíðini og fyrra parti av miðøld. Søgulig støð og hendingar seinni í tíðini verða tó eisini umfatað av verkætlanini.

**Føroyski parturin**

Tann føroyski parturin av verkætlanini tekur støði í Sandoynni og Skúvoynni. Heima á Sandi eru týðilig tekin um umfatandi víkingabústaðir, og hetta økið er tískil eitt hitt mest áhugaverda fornfrøðiliga granskingarumhvørvi í Føroyum. Skúvoyggin og Dímunar eru nógv umrøddar í føroyingasøguni. Har búði ma. Sigmundur Brestisson, sum um ár 1000 bar kristniboðskapin til føroyingar, og stríðið við ma. Tróndi í Gøtu gevur okkum eina ímynding av tíðini, ið nevnd verður víkingatíðin.

Tann verkliga ætlanin er, at menna sonevndar søguleiðir (saga trails), ið byggja á føroyingasøgu og víkingatíð. Hesar søguleiðir fylgja fyri ein part teimum gomlu bygdagøtunum, og tí verður her mest talan um, skelting, viðlíkahald og varðveitslu av teimum verandi.

Serligir faldarar verða gjørdir, sum lýsa tey søguligu støðini, tann ferðandi kann vitja.

Tað skrivliga tilfarið verður gjørt á enskum, donskum og føroyskum, - føroysk fornminni og søga eru eins áhugaverd hjá okkum føroyingum sum hjá tí útlendska ferðamanninum.

Byrjað er við fyrsta stigi í verkætlanini, sum er at savna inn søguligar upplýsingar. Føroya Fornminnissavn stendur fyri størsta partinum av hesum arbeiði. Men tað, sum hevur við aðrar frásøgur og sagnir at gera, verður innsavnað av staðkendum fólki í Sandoynni og í Skúgvi. Innsavnanin verður gjørd í samstarvi við Marnu Jakobsen á Sandoyar Kunningarstovu og Julionnu Joensen á Sands bygdasavni.

Verkætlanin kann vera við til skapa virksemi á staðnum og eisini knýta onnur tiltøk og aðrar ætlanir at sær. Sum dømi kunnu nevnast, gisting, flutningur, bátatúrar, søla av minnislutum, sjónleikur, stevnur og framsýningar - bátaferðir og dansistevnur og onnur søgulig og siðsøgulig tiltøk.

Í marknaðarføringshøpi, er stórt virði í hjá Føroyum at vera við í einum breiðari netverki, sum er felags um eina slíka verkætlan. Av ítøkiligum felags tiltøkum er talan um eina felags heimasíðu, blaðið Viking Heritage Magazine og at enda eina bókaútgávu, sum lýsir virksemi í øllum londun-um hvørt sær.

**Fíggjarkarmur.**

Ísland er sum høvuðspartur leiðari av verkætlanini. Umsóknin til verkætlanina varð latin Northern Periphery Programme í september mánaða í fjørð og varð sum heild góðkend fyri jól.

Karmurin fyri alla verkætlanina er tilsamans um 7,5 mill. krónur. Við at vera partur av verkætlanini binda stovnarnir báðir seg til eina íløgu uppá 285.000 kr, meðan sama upphædd verður latin í stuðli, soleiðis at tann føroyska fíggjarætlanin verður um 570.000 kr í tey 3 árini -frá januar 2003 til desember 2005.

Føroya Fornminnissavn og Ferðaráð Føroya vóna at henda søguliga verkætlanin við innalendis samstarvi verður við til menna vinnulívið Sandoyar sýslu, sjónliggera søgu okkara og skapa møguleikar soleiðis, at ferðafólk - bæði einstaklingar og bólkar - fáa eina dygdar uppliving av og størri kunnleika um søgu okkara.

# Gongufólk á bátastevnu

TÍÐINDASKRIV

Gongufeløgini í Vágum, Havn og Eysturoynni hava tikið av innbjóðing frá Undirhúsinum í Vestmanna at luttaka í Bátastevnuni »Kjalarvatn«, sum verður leygardagin

– So komið øll gongufólk og latið okkum stevna móti Vestmanna eftir gomlu varðagøtuni úr Kvívík, sigur Ingerð á Trøðni á Kunningarstovuni í Havn.

Hon sigur, at neyðugt verður at melda seg til á kunningarstovunum, so tey kunnu skipa fyri farti til Kvívíkar, haðani farið verður til gongu kl 14.

Tilmelding á Tlf. 33 34 55, 44 94 49, 44 48 60 og 31 57 88.

# Gamlir skótar til gongu

GONGUTÚRUR
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin komandi, 25. mai, er ætlanin at savna saman allar fyrrverandi og núverandi leiðarar og gamlar skótar frá tíðini á Bakkahellu og fram til dagin í dag, sum hava virkað í Skótaliði Sigmunds Brestissonar og Tóru Sigmundsdóttir, til ein gongutúr niðan á Húsareyn og so víðari haðani.

Ferðaleiðari verður Tryggvi Sondum.

Aftan á gongutúrin verður farið oman í skótahøllina til ein drekkamunn, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

Til ber at melda seg til gongutúrin hjá Tryggva, tel 313429, hjá Høgna tel 328145/211030 ella hjá Hildur tel 319418/219418

# Sofus Hansen til minnis



So tynnist í vinarskara. Mánadagin 5. mai andaðist Sofus Hansen bert 49 ára gamal.

Vit, sum kendu Sofus, vita, at Sofus var ein maður við æru.

Eg kom at kenna Sofus síðst í 70-unum, tá eg flutti til Runavíkar og kom at ganga í bindiklubb saman við Klaru, konu Sofus. Vinskapurin okkara millum hevur altíð verið góður, og tað var altíð so sera hugnaligt at fáa Sofus á vitjan ella at fara inn til hansara. Hann var altíð so blíður og prátingarsamur og so var hann so sera hittinorðaður, at tú visti ikki av, at fleiri tímar vóru farnir, og tíð var at fara til hús.

Vit fluttu til Danmarkar í 1992, men tað gjørdi ikki nakran skilnað okkara millum. Sofus var trúfastur at vitja okkum. Einaferð Sofus sigldi yvir í Alaska og skuldi koma heim, bleiv avtalað, at Klara og Johanna skuldu koma niður til Danmarkar til okkum at ferðast, so kundu tey trý taka eina góða feriu saman niðri í Danmark. Tað má eg siga, at tað vóru nakrir so sera hugnaligir dagar, vit høvdu saman tá.

Sofus var ein sera avgjørdur maður, eitt ja var eitt ja og nei var eitt nei.

Eg kann ikki lata vera við at fortelja, at hann segði einaferð fyri okkum, at tá hann sigldi úti, eg meini, at manningin var úr Thailandi og Vietnam. Í øllum førum so ótu teir bara rís aftur við døgurðanum, og tað var nakað, ið Sofus ikki var serliga glaður fyri, hann vildi hava eplir til døgurða, og Gud hjálpi tú mær, um hann ikki hevði fingið hendan kokkin at kóka eplir til hansara í staðin fyri rís. Í dag tá eg hugsi um tað, rokni eg við, at hesin thailendski kokkurin hevur hildið so nógv av Sofusi, at hann hevur givið honum alt tað, hann ynskti.

Sofus og Klara fingu ein eftirnølara, Kartin, sum nú er fimm ára gamal. Hvørja ferð eg tosaði við Sofus, segði hann, at tað var tað besta, sum var hent honum. "Tú blívur fimtan ár yngri", segði hann.

Sofus hevur altíð sæð stórt í sínum børnum og hevur stuðlað teimum bæði so og so. Jóhanna, Kári og Mortan hava øll spælt við NSÍ, og tað var Sofus ótrúliga stoltur av. Hann var við til hvønn tann einasta dyst og var so sera spentur nú tað gekk so væl hjá NSÍ í fjør.

Nú byrjar eitt nýtt kappingarár, men í millum áskoðarararnar verðrur ongin Sofus Hansen at síggja. Sofus er ikki millum okkum longur, men minnið um hann fara vit at goyma í okkara hjørtum.

Má Harrin hjálpa og styrkja tykkum, ið stóðu Sofusi nær, í tykkara sorgi og sakni.

Klara og lítli Kartin, Kári, Jonna og lítla Maria, Mortan og Oddvá, Jóhanna og Agnar og so systrarnar hjá Sofusi, Maria, Hanna Elina og Katrina við familjum.

Friður veri við minninum um Sofus.

**Jóngerð við familju**


Trø & runnar

Íslendskan Píl, Alaska Píl, Lonicera, Spirea, Björk, Poppel

Einans 28,- kr. stk

Hyld 18,- kr. Rön 20,- kr.
Sólber og ribsber 39,- kr.
og nógv nógv onnur

Rimmar tilboð frá 23. mai til 31. mai
10 summarplantur einans 100,- kr.
Stórt úrvæl

Annars alt annað til urtagarðin
Kálk, gjøtning, móti mosa og ókrúti
grasfræ, spagnum, flís o.a.

Sig tað við blómum

Fa. Karl Øster
Blómuhandil
Tvøroyri
Tlf. 37 10 94

Sosialurin 341800